# Tvey eiðisfólk í praktik í Tórshavn

**Fyrst fór eg niðan í Rás2, har eg skuldi tosa við ein praktikant, og síðan gekk leiðin niðan í Reyni-Service, har eg skuldi tosa við ein annan praktikant.**

STARVSVENJING
*Heini Niclasen*

**Navn:** *Doris Joensen*
**Búðstaður:** *Eiði*

*Hvar ert tú í praktik?*
Eg eri í praktik í Rás2,

*Hví valdi tú at fara í praktik í Rás2?*
Eg valdi at fara í Rás2 av tí, at eg helt, at tað fór at verða áhugavert at prøva okkurt, sum man ikki ger til dagligt.

*Greið okkum eitt sindur frá tí arbeiðinum, sum tú fast við á Rás2?*
Eg siti við ein disk og taki telefonina, tá ið lurtarar rungja inn og senda heilsan og ynskja eitt lag. Síðan gongur leiðin inn í studio, har eg havi útvarpsendingina ynskiløtan millum kl.13 til kl.15. Eg geri eisini lýsingar, eg havi gjørt tríggjar higartil, og tað er ikki bara sum at siga tað at gera lýsingar.

*Hvussu eru fólkini í Rás2 at arbeiða saman við?*
Tey eru fitt at arbeiða saman við, tey eru ikki so alvorlig, sum eg hevði vænta at tey fóru at vera.

*Hevði tú eisini valt Rás2, hevði tað veri úti á bygd?*
Tað dugi eg ikki ordiliga at svara uppá, men tað rokni eg ikki við, av tí at tað hevði nokk ikki veri líka stuttligt, sum her í Havnini, tí her kenni eg meira fólk, enn eg geri úti á bygd.

*Ætlar tú tær at vera journalist, tá í tú ert ligu í skúlanum?*
Nei, tað er ikki planurin, eg havi planir um at vera kostmotologur, men mær hevði sikkurt dámt at verið journalistur.

*Hví valdi tú so ikki at fara í praktik hjá einum kostmotologi?*
Tí tað er nakað, sum eg ætli mær at prøva, tá ið eg fari at læra til tað. Tað er heldur ikki so nógv at gera, sum kostmotologur í Føroyum.

*Hvat eru høvuðsevnini í Rás2?*
Tað er undirhald, andaligt, ungdómur og so eisini tónleikasendingin fyri øll.

Navn: Pól Andrias Larsen
Búðstaður: Eiði

*Hvar ert tú í Praktik? Eg eri í praktik hjá Reyni-Service.*
Hví valdi tú at fara í praktik í Reyni-service? Tí at er eri áhugaður í bilum, og tí at tað er sera spennandi at arbeuða við bilum.

*Greið okkum eitt sindur frá arbeiðinum, sum tú fast við á Reyni-Service.*
Tað eru mest bilar, sum koma til eftirlit, har vit skifta oljufiltur og skifta olju á motorinum. Eg skifti eisini startara, vit skifta eisini nógv dekk, og eg plagi eisini at spenna bremsuskivurnar.

*Hevði tú eisini valt Reyni-Service, havði tað verð úti á bygd?*
Nei, tað hevði eg nokk ikki, av tí at so høvdu tað ikki verið so nógvir bilar at arbeitt uppá.

*Ætlar tú tær at verða bilmekanikari, tá ið tú verður vaksin?*
Kanska ikki orduliga sikkurt, eg havi hugsað um tað, men kanska eg fari at læra til okkurt innan fyri telduheimin.

*Hví valdi tú so ikki at fara í praktik í einum telduhandli?*
Tí at tað er so ringt at sleppa inn, eg søkti um at sleppa inn hjá Teldutænastuni, men har var eingin kjansur, tí at onkur annar var sloppin inn har, og nú havi eg funnið út av, at mær faktist dámar bertur at manerera við bilar enn at manrera við teldur.


Doris Joensen av Eiði er í praktikk á Rás2, har hon m. a. hevur verið við til at gjørt sendingina »Ynskiløtan«


Pól Andrias Larsen av Eiði hevur verið í praktikk hjá Reyni Service í Havn, har hann er sloppin at umvæla bilar

**Máta misnýtslu**

Í samrøðu við Ernu S. Hákonardóttir í blaðnum í gár varð nevnt um mátingarstokkar, sum til ber at fáa á Apotekinum, sum máta rúsevni í kroppinum. Í samrøðuni varð nevnt, at tað sæst, um rúsevni, heilivágur ella annað er í blóðinum. Hetta er ikki rætt. Mátað verður, um slík evni eru í landinum.

*blaðstj.*

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu
í stóru sorg okkara, tá okkara høgt elskaði
sonur, bróðir, svágur, mammubeiggi og drongur

**Dánjal Johannus Petersen,**
Porkeri

so brádliga varð kallaður heim til Harran.

Tøkk til tykkum mongu, ið vitjaðu í heimum okkara.
Tøkk til prestar og talarar fyri troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar, og øllum tykkum,
ið hjálptu til við jarðarferðina og ervið.

Tøkk til tann stóra skara , ið fylgdi honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.

*Fyri tey avvarðandi*
**Brynhild, Jacob Petur, Olga, Jónbjørg,**
**Petur Martin og Dóris**

Tá tagnaður er vevur,
ei bummur meira slær,
Gud dúk til síðis dregur
- tá birtist fyri tær:
Hvør vav teir myrku træðir
eins væl og gyltu bond
- í mynstrinum so fagrir
- Meistarans køna hond.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri samkenslu og sýndan heiður, tá
kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara



**Meinhardt Højgaard**
Saltangará

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum í starvast á B6 á Landssjúkrahúsinum, og sum vóru um hann, hesa seinastu vikuna hann livdi her á fold. Tit gjørdu tað besta tit kundu.

Tøkk fyri troystarík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og øllum tykkum
mongu sum á ymsan hátt hjálptu til.

Tøkk fyri blómur, kransar, uppringingar og kort.
Somuleiðis tøkk til tann stóra skaran, ið fylgdu
honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Eg eri uppreisnin og lívið;
Tann, sum trýr á meg,
skal liva, um hann so doyr.
Jóh. 11,25

Familjunnar vegna
**Jenny og børnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra
mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Poulina Mohr Jacobsen,**
Vágur

doyði og varð jarðað.

Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til
Eldrasambýlið og takk øll tit, ið fylgdu henni.

Ein serlig takk til starvsfólkið á Eldrasambýlinum.

*Fyri tey avvarðandi*
**Henrikka, Birta, Lena og Ingun**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
sum sýndu samkenslu tá okkara kæra mamma,
vermamma, omma og langomma

**Jenny Rebekka Lisberg,**
Sumba

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Tøkk til Ólavur Rasmussen, prest
og Hans Jacob fyri troystarrík orð.

Tøkk til sangarar, gravarar og kirkjutænarar.
Tøkk tit, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.

Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu mammu
til hennara seinasta hvíldarstað.

Guð signi tykkum øll !

*Familjunnar vegna*
**Børnini**



# Teitur spæla fyri filmsfólki í Hollywood

**Kendur amerikanskur sjónleikari skipar um eina viku fyri konsert í Los Angeles, har Teitur Lassen skal spæla fyri kendum filmsfólki. Áhugað plátufeløg verða væntandi eisini hjástødd hetta kvøldið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*


*Teitur Lassen fær nú eina hjálpandi hond frá amerikanskum sjónleikara, sum bjóðar fólki í Hollywood til serligt tiltak, har føroyski tónleikarin skal syngja og spæla*

Seinasta dagin í januar skal føroyski sangskrivarin og tónleikarin Teitur Lassen spæla fyri kendum filmsfólki í Hollywood.

Hetta er komið í lag umvegis amerikanska sjónleikaran Edward Norton, sum er kendur úr filmum sum Fight Club, Primal Fear og American History X.

– Umboðsmaðurin hjá mær í London hevur fingið hetta tiltakið í lag, og Edward Norton bjóðar so vónandi filmsfólki og vinum hjá sær til at hoyra meg spæla, sigur Teitur Lassen.

Umframt føroyska tónleikaran skal Peter Salett eisini spæla hetta kvøldið á The Mint, sum staðið kallast.

### Góður møguleiki

Tað er vanligt, at skipað verður fyri slíkum tiltøkum, og tað hevur stundum verið gyltur møguleiki fyri tónleikarar, sum eru á veg fram.

Endamálið við tiltakinum er at lata evnaríkar tónleikarar sleppa at spæla fyri fólki, sum á ymsan hátt kunnu geva teimum eina hjálpandi hond við karrieruni.

Teitur kennir ikki enn Edward Norton, men tað verður helst ivaleyst øðrvísi, tá hann hevur spælt fyri honum og hinum gestunum á The Mint um eina viku.

### Tekur upp í Nashville

Teitur Lassen hevur ferðast nógv í USA farnu árini, og hann er í løtuni staddur í Nashville, har hann er í holt við demouptøkur til eina komandi útgávu.

Her arbeiðir hann saman við tónleikaframleiðaranum Matt Bronleewe, sum eisini hevur arbeitt við songkvinnum sum Jennifer Page og Nataliu Imbruglia.

Mikudagin setir Teitur so kós ímóti Hollywood, har tann øðrvísi og spennandi uppgávan bíðar.

Teitur hevur sáttmála við eitt útgávufelag, men fleiri plátufeløg liggja fram við eftir gávuríka føroyska tónleikaranum. Millum teirra er Sony.

Teitur vónar, at okkurt av plátufeløgunum verður umboðað á konsertini hjá sær í Hollywood 31. januar.

Í februar mánaði kemur Teitur til Føroyar at gera upptøkur til eina føroyska fløgu, og tá verður helst eisini okkurt høvi at hoyra hann spæla á konsert.


